nøvn nú

## Heilsanir



***Gó›a fitta Margreta***
Lukku og gle›i á tínum 3 ára degi 14.09. Vit elska teg
***Ynskja mamma, babba, Rúna, Ninna og lítla systir Sesilia***



***Gó›a elska›a Durita***
Hjartaliga tillukku vi› 5 ára fø›ingardegnum í dag. Jesus pápi veri› hjá tær
***Heilsan omma, abbi og mamba***



***Gó›a Gerda***
Hjartaliga tillukku vi› 6 ára degnum í dag
***Bestu heilsur mamma, babba og Neli***



***Gó›a Gerda***
Hjartaliga tillukku vi› 6 ára degnum í dag. Eisini ein heilsan til Nela
***Heilsan omma, abbi, mammubeiggi og Annamostur***



***Gó›a Gerda***
Hjartaliga tillukku vi› 6 ára degnum í dag. Heilsa Nela frá okkum
***Mostur, gubbi, Karstin, Oddvør og Jóhan Kári***



***Hey hon sjálv!***
Hjartaliga tillukku vi› degnum í morgin. Her riggar tú bara heilt væl.
***Heilsan myndatakarin***
P.S. Ha ha…tú helt, tú slapp undan



***Gó›i Rói***
Hjartaliga tillukku á 3 ára degnum 18. september. Alt ta› besta í framtí›ini
***Ynskja Ey›bjartur og Klávus***



***Gó›i Ey›bjartur***
Hjartaliga tillukku á 8 ára degnum 17. sept. Jesus signi› framtí› tína
***Ynskja mamma, pabba og Klávus***



***Gó›u Ey›bjartur og Rói***
Hjartaliga tillukku vi› 8 og 3 ára døgunum 17. og 18. september. Harrni signi› framtí› tykkara
***Ynskja omman og abbin í Hvalba***



***Gó›i Djóni***
Vit ynskja tær hjartaliga tillukku vi› 10 ára degnum. Vónandi fær tú ein gó›an dag. Eisini er ein heilsan til tín og Svannu vi› ynski um tillukku vi› føroyameistaraheitinum í kapprí›ing fyri ung í 2000
***Omma og abbi***



***Gó›a Durita, He›in og Birita***
Gó›i He›in og Birita hjartaliga tillukku vi› 1 ára degnum 7. september, og Durita gó›a hjartaliga tillukku vi› degnum 16. september. Jesus pápi veri› hjá tykkum
***Ynskja Tóra og mostur***



***Gó›i Boas***
Hjartaliga tillukku vi› 7 ára degnum. Vónandi fær tú ein gó›an dag
***Muss og klemm omma og abbi***



***Gó›u Ey›bjartur og Rói***
Hjartaliga tillukku vi› 8 og 3 ára døgunum 17. og 18 sept. Alt gott í framtí›ini. Vit leingjast eftir tykkum. Muss og klemm
***Frá fastir og Hallur***



***Gudny Danielsen***
Hjartaliga tillukku vi› 30 ára degnum
***Bestu heilsanir Maria og Heri***



***Gó›i elska›i Djóni***
Vit ynskja tær hjartaliga tillukku vi› 10 ára fø›ingardegnum. Eisini tillukku vi› føroyameistaraheitinum í kapprí›ing. Vit elska teg nógv, 10 mussar til tín frá okkum
***Linda, Jónas, mamma og babba***



## FØÐINGAR

1. september fekk Pætur Thomsen, Ålborg, eina lítlasystur. Hon vigaði 4560 gr. og var 53,5 cm. long. Foreldur teirra eita Bina V. Rasmussen og Hans Jón Thomsen, Ålborg.

6. september fingu Heidi Joensen og André Heini Petersen, Klaksvík, ein son. Hann var 53 cm. langur og vigaði 3900 gr.

7. september fingu Anja Bernhardson, Miðvágur og Ólavur Zachariasen, Eiði, ein son. Hann var 52 cm. langur og vigaði 2740 gr.

7. september fingu Svanna Jacobsen og Livar Nysted, Hvannasund, eina dóttir. Hon var 51 cm. long og vigaði 3500 gr.

8. september fingu Birthe M. Christiansen og Esmar Elttør, Klaksvík, ein son. Hann var 56 cm. langur og vigaði 3950 gr.

9. september fingu Jacoba T. Winther og Bárður E. Poulsen, Tórshavn, eina dóttir. Hon var 53 cm. long og vigaði 3200 gr.

12. september fingu Maibritt Trondesen og Hjalmar Ingebrigtsen, Á Válinum, eina dóttir. Hon var 55 cm. long og vigaði 3750 gr.

12. september fingu Barbara J. Hansen og Finnbogi Berg, Tórshavn, ein son. Hann var 53 cm. langur og vigaði 3700 gr.

12. september fingu Karolina og Ólavur Thomsen, Kambsdalur, eina dóttir. Hon var 53 cm. long og vigaði 3500 gr.

13. september fingu Linda og DanErik Johansen, Tvøroyri, eina dóttir. Hon var 52 cm. long og vigaði 3150 gr.

13. september fingu Ingrid Hayfield, Tórshavn og Martin Eysturdal, Klaksvík, ein son. Hann var 54 cm. langur og vigaði 3545 gr.

14. september fingu Ingilín Berg og Vilhelm Matras í Havn ein son. Hann var 56 cm. langur og vigaði 4150 gr.

14. september fingu Anita Simonsen og Herólv Jensen, Sandur, eina dóttir. Hon var 54 cm. long og vigaði 3600 gr.

## ANDLÁT

**6. september**
Hans Poulsen, ættaður av Eiði, búsitandi í Havn, 92 ár

**7. september**
Lydia Johannesen, Sørvágur, 57 ár
Kaare Ullman, ættaður úr Klaksvík, búsitandi í Holstebro, 57 ár

**8. september**
Åge Nielsen, búsitandi í Danmark, 51 ár

**10. september**
Eivind Fosså, Tórshavn, 77 ár
Ella Hjøbro, Klaksví, 92 ár

**11. september**
Óli Svenning Justinussen, Klaksvík, 35 ár
Herjálvur Petersen, Havn, 69 ár

**12. september**
Tór Hansen, kokkur, Tórshavn, 62 ár

**13. september**
Magnus Dahl, hjá Rudolf, úr Vági, 67 ár

## *Eitt ljós á gøtu míni*

*»Um nakar ikki verður verandi í mær, verður hann kastaður út sum ein grein og følnar«.*

Jóh. 15, v. 6

Í gomlu søgnini um Gásadalsrisan Tóra rama og Mykinesbúgvan, nevndur Óli rami, hann, sum at enda vann sigur á risanum í harða bardaganum teirra millum, mátti risin fyri at tiggja lív lova Mykinesbúgvanum 3 sjaldsamar lutir, sum framyvir á hvørjum árið skuldu koma til Mykinesar, m.a. eitt stórt rekatræ, men eina varð lagt við, at ikki mátti gávan spottast ella speirekast, tí so fóru teir at missa hana med alla.

Er tað ikki sama áminning, okkum verður givin í orðunum í dag, har vit verða ámint um, at greinirnar kunnu missa sambandið við træið – at sjálvsagdi felagsskapurin, ið skuldi verið har millum træið og tess greinar kann forkomast og missast. Og tí verður heitt á okkum at verða verandi greinar á trænum, og so sjálvandi ikki at spotta ella speireka hesa okkara gávu og lívssamband, sum tá ið greinarnar fara til hendurs at berjast sínámillum – tá tann eina greinin frøist yvir vanlagnu hjá grannagreinini, ella ein onnur roynir við hóttanum og veipanum at kappa greinina omanfyri av ella ein triðja roynir at royta nálir og bløð av greinini í neðra fyri soleiðis at fríðka seg sjálva – heldur enn at tær allar áttu at peika á ta træið, har tær vóru settar og í lívi og levnaði royndu at byggja upp og lívga um træið heldur enn við sjálvsøkni og maktgirnd bara at hugsa um sjálvan seg og sína egnu grein. Eitt træ er ein heild, har allar greinarnar eiga at sleppa upp í part – har tær allar fingu sína uppgávu at røkja, og so skuldi verið sjálvsagt, at tær allar virdu hvørja aðra aldan tí, at uttan træið eru tær einki, sum eisini út frá teirri sannroynd, at heldur ikki træið kann verða greinarnar fyriuttan. Trænum nýtist greinarnar fyri at vera eitt træ, og missir træið greinarnar, ella fara greinarnar í sjálvsøkni at kappa hvørja aðra av ella kappa av sambandið við træið, so verður ikki leingi, at træið følnar og doyr. Og tá hava vit sjálvi sagað ta greinina av, har vit sita og vóru sett. At tað lættliga kann henda, verða vit ámint um í dag; men so skuldu vit við myndini av trænum eisini hoyra gleðiboðini um, at við Jesusi er ikki talan um nakað vanligt træ, ehldur ikki vóntræ. Ja, hann er og verður eitt løgið, óskiljandi træ, sum hvør ein urtagarðsmaður mundi havt ringt eyga á, tí hetta træið er longu felt. Langa fríggjadag høgdu teir træið niður, og júst tá kom tað – enntá í deyðanum – at bera mikla frukt. Hetta træið, sum okkum óskiljandi fær sítt lív frá hinum æviga Guði – træið, sum heldur ikki deyðin kundi gera enda á, men ið sum krossing træ ber okkum gleðiboðini um, at eisini har vit snávaðu og sviku, har var hann verandi álitið, og har vit í synd okkara royndu at fella træið, har vildi Guð tað øðrvísi. Amen.

**Martin R. Jacobsen**

## KIRKJUR & SAMKOMUR

### Gudstænastur 13. sunnudag eftir Trinitatis
*Havnar kirkja:* kl. 11, altargangur, skriftamál kl. 10.40, Bjarni Bæk. (Talvan gongur fyri Sunnudagsskúlan hjá Heimamissióniní).
*Argir:* kl. 11, altarg., Kjartan Mørkøre
*Vesturkirkjan:* kl. 11, Sverri Steinhólm
*Kvívík:* kl. 12, altarg., skriftarmál kl. 11.50, Marjun Bæk
*Vestmanna:* kl. 11, Martin R. Jacobsen
*Christianskirkjan:* kl. 11, altarg., Hans Eiler Hammer
*Tjørnuvík:* kl. 12, altarg., Inga Poulsen Dam
*Sørvágur:* kl. 11, David Johannesen
*Hellur:* kl. 11, Uni Næs
*Glyvrar:* kl. 11, fráfaringargudstænasta, Jónsvein Bech
*Sandvík:* kl. 12, Ólavur Rasmussen
*Tvøroyri:* kl. 11, Petur M. Rasmussen
*Selatrað:* Heri J. Joensen
*Hvannasund:* kl. 12, altarg., fráfaringargudstænasta, Meinhard Bjartalíð).

(Talvan gongur á Eiði og við Norðskála fyri KFUM-skótarnar í Føroyum).

### Ebenezer
Sunnudagin kl. 12 sunnudagsskúli, kl. 18 evangeliskt møti, kl. 21 útimøti.
Mánadagin kl. 20 bønarmøti.

### Hvítusunnusamkoman Yviri við Strond
Sunnudagin kl. 11 morgunmøti, kl. 18 evangeliskt møti.
Øll eru vælkomin.

### Filadelfia, Landavegur 22
Í dag kl. 17 landsbøn, í morgin kl. 11 morgunmøti, kl. 18 kvøldmøti.
Mánadagin kl. 20 bønarskúlin.

### Samkoman Immanuel
Sunnudagin kl. 13 sunnudagsskúli, kl. 17 møti.

### KFUM og KFUK í Havn
Mánadagin kl. 15 í KFUK: Eldrasamkoma við Johnny Johannesen.
Týsdagin kl. 17 í KFUK: Várgleði fyri børn, bíbilsøga og videofilmur um dýrini í Valbakkaskóginum, annar partur.

### Aglow, Tórshavn
Fundur verður í hølunum hjá Frelsunarherinum leygarkvøldið kl. 20, allar kvinnur eru vælkomnar.

### Frelsunarherurin, Tórshavn
Sunnudagin kl. 11 møti, Palli Petersen talar, kl. 13.30 sunnudagsskúli, kl. 17.30 bøn, kl. 18 møti við Toril og Niels Edvard Olsen.

### Rhema á Hálsi
Fríggjakvøldið kl. 18-19 A.T.A.P. (Barnaklubbi).
Missiónskonferansa við Jørn Hyldgaard úr Danmark. Fríggjakvøldið kl. 20 missiónsmøti.
Leygarmorgunin kl. 10-12 leiðarasamling, kl. 20 missiónsmøti.
Sunnudagin kl. 11 møti og sunnudagsskúli, kl. 18 missiónsmøti.
Morgunbøn mánadag til fríggjadag kl. 8.30-9.30. Øll eru vælkomin.

### Meinigheitin í Hoyvík
Sunnudagin í Hoyvíkar skúla kl. 14 sunnudagsskúli, kl. 17.30 bøn og kl. 18 møti við Svenhild og Harald Haraldsen. Øll eru vælkomin.

### Meinigheitshúsið í Havn
Sunnudagin verður sunnudagsskúli kl. 14 og møti kl. 18 við Claus og Jensu Højgaard. Innsavnan til ytrimissión.
Mánakvøldið venur Manskórið kl. 19.55.
Týskvøldið verður bíbliutími kl. 20 við Klæmint Tausen.
Mikukvøldið venur Meinitheitskórið kl. 19.
Hóskvøldið verður ungdómsmøti kl. 20 Sang og vitnikvøld.

### Missións- og ungdómshúsið á Glyvrum
Leygardagin kl. 9.30 verður morgunmatur og bønarløta.
Sunnudagin kl. 14 verður sunnudagsskúli og kl. 19 verður møti, har tey ungu luttaka við sangi og vitnisburði. Øll eru hjartaliga vælkomin.

### Saron, Vestmanna
Sunnudagin kl. 18 møti. Mánadagin kl. 20 bønarmøti.

### Felagsungdómsmøti fyri Eysturoy
verður í missiónshúsinum í Leirvík í kvøld kl. 20, talari verður Torleif Johannessen. Eisini verður ein nýggjur lovsangsbólkur, møguleiki fyri samtalu/forbøn, drekka og eftirmøti. Øll eru hajrtaliga vælkomin.

### Filadelfia, Sundalagi
Bønarbólkur úr Havn hevur møti í Hósvík sunnukvøldið kl. 18.

### Kirkjan, Norðskála
Sunnudagsskúli verður sunnudagin kl. 14.30. Øll eru hjartaliga vælkomin.

### Nebo á Toftum
Sunnukvøldið kl. 18 greiða Janus Gunnarsson og Høgni Johannesen frá OM arbeiði í Asia.

### Meinigheitshúsið á Skála
Sunnukvøldið kl. 19 møti við Signar á Reynatrø. Verið hjartaliga vælkomin.

### Sjómanskvinnuringurin á Skála
Týsdagin verður farið til Havnar í Tilhaldið, Tórsgøta 21. Frá kl. 14-17 hjálpa vit til við at seyma bundnar puntar saman til teppir. Allar kvinnur vælkomnar við. Farið verður kl. 13.00 frá meinigheitshúsinum.

### Ørkin, Saltangará
Møti verður sunnudagin kl. 17 í Arbeiðarafelagshúsinum Hæddini í Saltangará.
Týsdagin kl. 20 húsmøti hjá Irenu Bech, Skipanes.
Hósdagin kl. 20 bønarmøti.
Morgunbøn er mánamorgun, mikumorgun og fríggjamorgun frá kl. 6-7. Verið hjartaliga vælkomin.

### Keldan, Skálafirði
Leygarkvøldið kl. 21 opið hús, ung frá Rhema luttaka.
Sunnudagin kl. 17 møti við Rannvu og Eiler á Royðutoft. Barnamøti kl. 17. http://www.keldan.fo

### Karmel, Eiði
Møtirøðin heldur fram í dag kl. 20, Petur Magnusson talar. Sangbólkurin Gittit syngur. Bønarløta verður kl. 19.30. Sunnudagin gudstænasta (lestur) kl. 11. Sunnudagsskúli kl. 14.30. Møti kl. 19.00, (vitnimøti) Gullak, Jónhilda og Jógvan syngja. Bønarløta verður kl. 18.30. Øll eru hjartaliga vælkomin. Innsavnan til Karmel.

### Siloa, Fuglafjørður
Møtirøð við Osvald Kjærbo byrjar sunnukvøldið kl. 18 og heldur fram mánakvøld, týskvøld og mikukvøld kl. 20. Øll eru hjartaliga vælkomin.

### Betania, Skopun
Sunnudagin kl. 10.15 sunnudagsskúli, kl. 11 morgunmøti, kl. 19 kvøldmøti, Símun Jacobsen talar. Øll eru vælkomin.

### Sands Missiónshús
Sunnudagin kl. 10.30 sunnudagsskúli, kl. 18 møti. Øll eru vælkomin.

### Zion, Sandur
Sunnudagin kl. 13.30 sunnudagsskúli.

### Missiónshúsið á Tvøroyri
Sunnudagin kl. 14 sunnudagsskúli, kl. 18 møti við Hanus Poulsen, Leirvík og Hallur Ludvig. Øll eru hjartaliga vælkomin.

### Frelsunarherurin, Vágur
Sunnudagin kl. 14 sunnudagsskúli, kl. 18 møti við Sigmund, Gimmi og Samael.
Mánadagin kl. 20 heimaforbundið.

### Betel, Vágur
Sunnudagin kl. 11 breyðbróting, kl. 13.30 sunnudagsskúli, kl. 18 evangel. fundur, kl. 21 útifundur (um viðrar).
Mánadagin kl. 20 bønarfundur.
Ónsdagin kl. 20 uppbygg. fundur.

### Sion, Vágur
Morgunmøti verður sunnudagin kl. 11, sunnudagsskúli kl. 11.30 og møti kl. 16.
Telefonandakt 373 777.

### 80 ár

**Leygardagin 16. sept. verður Johs. Andr. Næs 80 ár. Hann heldur dagin heima á Sólteigi 6 við einum drekkamunni seinnapartin millum kl. 15-18. Kvøldið verður hildið saman við familjuni.**